# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstroling á Føroyabanka. Túrur nr. 1408.
# Tíðarskeið: 19/03-27/03 - 2014

**Fólk við frá Havstovuni:** Petur Steingrund, Regin Kristiansen, Dagunn H. J. Clementsen og Poul Vestergaard.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa og longu.

**Eyka uppgáva:** Nakað av toski, rogni og øðrum varð selt til matstovuvinnuna í Havn.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m. CTD-in. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini hóskvøldið 20/3 kl. 22. Tóku fríggjadagin tvær støðir, sum lógu eftir frá túri 1406, men ikki var veður at sigla til hinar báðar støðirnar, sum restaðu í fyri túr 1406. Byrjaðu at taka støðir á Føroyabanka leygarmorgunin. Tóku bert fýra støðir sunnudagin vegna veður. Hildu á at taka støðir til mikudagin kl. 18, men tá lógu tvær djúpar støðir eftir. Sostatt fingu vit tikið 27 av 29 hálum. Trupulleikar við CTD-telduni gjørdu, at bert tríggjar CTD-støðir vórðu tiknar.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var bert eftir ætlan fyri hýsu (umleið 400). Fyri tosk fingu vit meginpartin av veiðini í einum háli, og tí náddu vit ikki at taka nóg nógvar nytrur. Vit fingu ov lítið av upsa til at náa ætlaða talið av nytrum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 27. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 20. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Tað var meira av toski at fáa enn vanligt hevur verið eftir 2006 (Talva 1), men tó er hetta lítið í mun til árini frá 1996 til 2003 (Mynd 1). Vit fingu lítið av hýsu, men tó nakað av smáari hýsu. Veiðan av upsa var sum vanligt seinnu árini. Magakanningarnar vístu, at tað var meira til av bæði smáari og stórari (gýtandi) nebbasild enn vanligt hevur verið seinastu árini. Nøgdin av krabbadýrum í toska- og hýsumagum var framvegis lítil í mun til onnur ár.

**Talva 1**. Veiða, nytrur og magar tikin á túri 1408 – yvirlitstroling á Føroyabanka.

| FISKASLAG | KG í 27 hálum í 2014 | Nytrur | Magar | KG í 10 hálum í 2013 | Lutfall kg per hál |
|---|---|---|---|---|---|
| TOSKUR | 4184.069 | 128 | 37 | 1141.635 | 1.36 |
| HAVMÚS | 2616.569 | | | 399.986 | 2.42 |
| HÝSA | 1037.52 | 392 | 121 | 85.280 | 4.51 |
| GULLLAKSUR | 811.254 | | | 8.375 | 35.88 |
| SILVURMURTUR | 702.186 | | | 0 | |
| UPSI | 440.070 | 96 | 25 | 161.510 | 1.01 |
| LONGA | 247.680 | 44 | 8 | 105.070 | 0.87 |
| LOLIGO | 211.693 | | | 94.231 | 0.83 |
| GLÝSUFISKUR | 191.351 | | | 511.504 | 0.14 |
| SVARTKJAFTUR | 158.369 | | | 0 | |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 99.051 | | | 1.083 | 33.87 |
| STREYMSILD | 65.240 | | | 2.214 | 10.91 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 49.618 | | | 119.818 | 0.15 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 35.968 | | | 0 | |
| SKRAMBUL | 28.682 | | | 42.751 | 0.25 |
| RÍSNA LANGASPORL | 16.906 | | | 0 | |
| BUKSVARTI HÁVUR | 16.285 | | | 0 | |
| NEBBASILD | 13.606 | | | 2.360 | 2.14 |
| HAVTASKA | 11.425 | | | 6.485 | 0.65 |
| KNURRHANI | 9.136 | | | 10.253 | 0.33 |
| TUNGA | 7.202 | | | 2.426 | 1.10 |
| SKØTA | 7.150 | | | 17.465 | 0.15 |
| BLÁLONGA | 7.060 | | | 0 | |
| SANDSKØTA | 6.175 | | | 0 | |
| LÍTLA BROSMA | 6.095 | | | 0 | |
| BROSMA | 6.070 | 2 | | 7.020 | 0.32 |
| REYÐI KNURRHANI | 5.296 | | | 0 | |
| SANDSPRØKA | 4.400 | | | 1.439 | 1.13 |
| ROGNKELSI | 3.380 | | | 0 | |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 1.559 | | | 0.490 | 1.18 |
| HVASSASPREK | 0.449 | | | 0 | |
| TILSAMANS | 11001.510 | 662 | 191 | | |







Mynd 1. Veiða upp á roynd (kg per troltíma) av toski, hýsu, longu og upsa hjá Magnusi Heinasyni í mars 1983 til 2014. Fyri 1994-1995 eru eingi tøl tøk, og í 2004-2005 var eingin túrur gjørdur.

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í dokumentinum "Tur1408d.doc".

<u>Petur Steingrund</u>